# AB vann aftur

Akademisk Boldklub - AB tók ímóti Hvidovre á heimavølli í gjár. Úrslitið varð, at heimaliðið vann 3-2. AB legði seg á odda tríggjar ferðir í dystinum, og í tveimum førum eydnaðist tað Hvidovre at javna leiðsluna, men alt endaði væl hjá AB. Klaus Lykke legði AB á odda í 21. minutti, men longu í 28. minutti javnaði Marc Olsen fyri Hvidovre. Beint áðrenn steðgin legði Nicklas Thorsgård AB á odda aftur. Bert fýra minuttir inn í 2. hálvleik javnaði Fosu Boateng fyri Hvidovre. Leingi varð líkt til, at liðini fóru at býta stigini millum sín, men í 85. minutti skoraði Casper Andersen sigursmálið fyri AB. Føroyski landsliðsspælarin, Christian Høgni Jacobsen kom inn tá 57 minuttir vóru farnir av dystinum.



# Keflavík hevur enn munin

Símun Samuelsen varð ikki við liðnum hjá Keflavík, sum stríddi seg til ein 2-1 sigur á útivølli ímóti Fjølni leygardagin. Gunnar Már Guðmundsson legði Fjølnir á odda eftir 35 minuttirs spæl, men seks minuttir seinni javnaði Guðmundur Steinarsson til 1-1. Tá 2. hálvleikur varð hálvrunnin skoraði Jóhann B. Guðmundsson sigursmálið fyri Keflavík. Liðið, sum andar Keflavík í nakkan, FH úr Hafnarfjørðinum vann 3-0 á Vali. Keflavík hevur 43 stig fyri 19 dystir, FH hevur 38 stig fyri 18 dystir. FH hevur ein útsettan dyst til góðar ímóti Breiðablik. KR og Valur hava 32 stig fyri 19 dystir. 22 umfør eru í íslendsku Landsbankadeildini.



*Lagið er framúr í Gøtum og Leirvík, eftir at Víkingur fyri triðju ferð av trimum møguligum fekk trý stig burtur úr dysti móti NSÍ*
*savnsmynd*

*Víkingur*

*NSÍ*

Víkingur-NSÍ 2-1 (0-0)

# Víkingur fullførdi NSÍ-eyðmýkingina

**Víkingur og NSÍ hava leikt tríggjar dystir ímóti hvørjum øðrum í ár, og Víkingur hevur vunnið allar dystirnar. Hendan seinasta vunnu teir 2-1 á heimavølli í gjár**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Víkingur hevur havt tað gott heima í Sarpugerði í ár, og tí var tað lagt upp til ein sera spennandi og tættan dyst, tá ið meistararnir úr NSÍ vitjaði í gjár. Víkingur hevur havt takið og NSÍ í ár, og hevði undan dystinum vunnið báðar innanhýsis uppgerðirnar ímillum liðini.

### Deydligur 1. hálvleikur

Dysturin byrjaði varliga, har liðini nýttu eina løtu at kenna seg tilrættis á vøllinum. Eftir hetta byrjaðu liðini at ota seg nærri brotsteiginum, og tá ið smáir 10 minuttir vóru farnir, var um reppið, at Víkingur legði seg á odda. Símun Louis skallaði væl mótvegis málinum, men á sjálvari málstrikuni bjargaði Johan Troest Davidsen.

Eftir hetta dovnaði aftur nakað, og liðini høvdu truppult við at nærkast málinum. Langskot var javnan ein loysn, og tað besta av hesum mundi Milan Pecjic hjá NSÍ eiga, men hetta var ikki nokk til at fáa hol á.

Tað var als ikki óvæntað, at fyrri hálvleikur endaði málleysur. Liðini sóu ikki út til at hava tann stóra viljan til at koma heilt fram á vøllin at skapa nakað vandamikið.

### Intensitetur

Seinni hálvleikur var ikki serliga líkur tí fyrra, tá hugt at bæði tí innihaldsliga og stigatalvuni. Leikararnir sóu út til at kýta seg meira, og viljin at vinna var avgjørt til staðar. Serliga eftir 10 minuttum av seinna hálvleiki angaði av, at okkurt mál fór at koma. Zoltán Bükszegi var tætt við at leggja Víking á odda eftir gott arbeiði av Andreas Lava Olsen, men ungarski leikarin var ikki nóg avgjørdur.

Bara fimm minuttir seinni fall fyrsta málið í dystinum. Nenad Stankovic sendi bóltin í brotsteigin, og tá ið verjuleikari og málmaður hjá Víkingi ikki kundu semjast um at taka bóltin, tá takkaði Øssur Dalbúð fyri, og legði NSÍ á odda 1-0.

Víkingar høvdu tó ikki meir enn fingið armarnar niður aftur, tá ið bólturin lá í teirra málið. Hetta málið stútaði Símun Louis Jacobsen í netið, eftir at hava móttikið innlegg frá Áslakki Petersen.

Stutt eftir var Víkingur tætt við at leggja seg á odda, men tætt undir málinum bleiv bólturin stútaður við síðuna av.

Tíggju minuttir fyri leiklok fall avgerandi málið, og var tað heimaliðið sum átti hetta. Eitt langt innkast bleiv kastað inn í feltið, haðani bólturin bleiv spældur aftur til Atla Gregersen, sum við vinstra beini stýrdi bóltinum meistarliga í høgra málhorn.

Innskifti Klæmint Olsen var tætt við at bjarga eina stig-ið til NSÍ, tá ið hann stútaði á stongina, men tættari hesum kom hvørki av liðunum.

NSÍ misti 2. plássið til B36, meðan Víkingur bítur seg fast í oddan av Formuladeildini.

## Teir spælið, vit kjansirnar

Soleiðis segði sigursharrin hjá Víkingi, Atli Gregersen, eftir dystin.

- Teir, serliga Nenad, trilla bóltin væl runt, men vit royna at pløkka bóltin frá teimum. Bæði liðini standa væl á vøllinum, og ikki nógvir málmøguleikar. Teir hava spælið, og vit kjansirnar, helt Atli eftir dystin.

Komandi vikuskifti skal Víkingur til Streymnesar at vitja EB/Streym, sum eru ósigraðir á heimavølli.

- Vit fara at royna at spæla eitt puss. Vit eru komnir eitt pláss longur upp hvørt ár, so vit satsa uppá at koma enn longur upp í ár, segði Atli, sum í sama viðfangi staðfesti, at tú ongan veg kemur uttan hart arbeiði.

## Eitt stórt vónbrot

Landsliðsleikarin hjá NSÍ, Jónas Tór Næs, leikti sín fyrsta dyst sum NSÍ-ari ímóti Víkingi. Hann var sum vera man vónbrotin eftir tapið.

- Tað er eitt vónbrot at missa 2. plássið. Vit fóru 100% eftir tí. Allir eru vónbrotnir, uttan iva, segði ein sjálvur sera vónbrotin Jónas eftir dystin.

- Vit áttu at verið meira konsentreraðir tá ið vit komu á odda. Teir fáa tveir møguleikar og skora uppá teir, segði Jónas.

Komandi umfar hevur NSÍ møguleika at innheinta B36 aftur, tá ið júst B36 kemur á vitjan í Runavík.

- Tá skulu trý stig til. Vit hava vunnið teir fyrr í ár, peikar Jónas at enda á.